Meinhard Joensen nevar bóltin uppí loft, og Egil Zachariasen stendur klárur við handaru stong at skalla útjavnandi málið

Mynd: SjH

KÍ – B36 1-2 (0-0):

B36 hevði hepni

Havnarmenn høvdu tað hepnið, sum eitt meistaralið hevur, og tí vunnu teir tann tætta og spennandi dystin í Klaksvík. KÍ trýsti stórar partar av dystinum, og B36 hevði ikki nógvar royndir á málið. Tó vendu havnarmenn dystinum á høvdið móti endanum og fóru avstað við øllum. Einum meistaraliði líkt

FÓTBÓLTUR
Stefan í Skorini

B36 stevnir beinleiðis ímóti FM-heitinum. Sigurin á KÍ í Klaksvík og tapið hjá GÍ móti NSÍ merkir, at sjálvt ikki ein ógvuliga bjartskygdur gøtumaður hevur vónir um at taka heitið frá havnarliðnum. Við at vinna meistaraheitið tryggjar B36 sær samstundis greipuna fyri fyrstu ferð í søgu felagsins.

Enn er alt tó ikki avgjørt, tí B36 skal hava ein sigur móti HB næsta vikuskiftið fyri at tryggja sær FM. Um tann dysturin verður vunnin, so setir B36 nýtt met við at vinna trettan dystir á rað. HB eigur metið við tólv dystum í 1974.

KÍ fór eftir sigrinum

Frá byrjan av var eingin ivi um, at klaksvíkingar fóru eftir sigrinum. Kurt Mørkøre og Aleksander Djordjevic vóru allatíðina vandamiklir og góvu B36-verjuni mikið høvuðbrýggj. Álopsparið er sterkt í luftspælinum og tað var eftir høvdarar frá teimum báðum, at Kí var nær við at leggja seg framum.

B36 hevði tó fyrsta stóra málmøguleikan. Jákup á Borg fór hegnisliga framvið tveimum verjuleikarum, men varð órógvaður í skotløtuni, og tí bjargaði Meinhard í málinum. Jákup vildi hava brotsspark, men Niklas á Líðarenda lat ikki við seg koma.

Dómarin hevði annars eina ógvuliga torføra uppgávu, tí nógvir harðir nærdystir vóru, og leikararnir grenjaðu um nærum hvørja avgerð hjá Niklasi. Eisini var nógv munnhøgg innanhýsis millum leikararnar, sum var ógvuliga sjónligt. Dómarin var noyddur at bríksla fyri ógvuliga nógvum fríspørkum gjøgnum dystin, tí leikarar vóru heitir.

Restina av hálvleikinum var heimaliðið vandamiklari og var ógvuliga nær við at skora fyri steðgin.

Nærmast var Kurt Mørkøre, sum allatíðina var ein hóttan móti málinum hjá Tróndi Vatnhamar. Hjalgrím Eltør fór hegnisliga framvið Jens Kristiani Hansen og legði innfyri til Kurt Mørkøre, sum høvdaði uppum staddur tætt undir málinum. Pól Thorsteinsson ansaði eftir Kurt henda dagin, og vágbingurin hevði eina torføra uppgávu, tí Kurt spælir harðliga og er allatíðina á markinum til tað ólógliga. Teir báðir høvdu eisini ein persónligan dyst sínámillum.

Kurt var aftur nær við at skora løtu seinni. Hann var fyrstur á einum bólti inni í málteiginum og lyftir uppum málverjan, sum kom út ímóti. Pól Thorsteinsson bjargaði tó á strikuni og beinir burtur.

Næsta málmøguleikan hevði Aleksander Djordjevic. Hann setti høvdið á eitt innlegg úr høgru. Tróndur hálvbjargar bóltin á stongina, har B36 verjan er fyrst at beina burtur.

Kurt á blettinum

KÍ tók við eftir steðgin, har teir sleptu. Heimaliðið spældi uttan at vera bangið fyri tapi og hevði fleiri sera nask álop beint eftir steðgin.

Tíðliga í hálvleikinum varð Aleksander Djordjevic spældur leysur av Tomislav Sivic, men skotið fór á stongina aftanfyri Tróndur.

Kurt Mørkøre, sum hevur skorað í nærum øllum dystunum, hann hevur spælt fyri KÍ í ár, fekk endiliga sett bóltin í málið eftir fleiri royndir. Málið var ógvuliga einfalt. KÍ hevði fríspark á egnari hálvu, sum varð sent inn í brotsteigin, har Pól Thorsteinsson ikki fekk sparka burtur. Bólturin endaði hjá Kurt, sum róliga sendi framvið Tróndi. 1-0 til KÍ, og meistaraheitið hjá B36 var knappliga langt burtur. Tað er ikki at taka munnin ov fullan, at Kurt Mørkøre er vandamiklasti áleyparin í landinum í løtuni. Hann er ein støðug hóttan móti málinum hjá mótstøðuliðnum.

Men havnarliðið reistist aftur.

Miðvágur umaftur

B36 hevur fyrr í ár verið aftanfyri, men hevur síðani vent dystinum. Hetta sóu vit í Miðvági, tá B36 var aftanfyri við einans tíggju monnum, men tá eydnaðist tað B36 at vinna hóast alt.

Spælið vendi nakað móti endanum av dystinum. B36 royndi at seta álop í verk, men tað royndist illa, tí KÍ leikararnir høvdu gott tak á dystinum. Piotr Krakowski sendi Áka Mørk heilt fram í álopið í eini roynd at bróta verjuna niður.

Innanfyri nakrar heilt fáar minuttir fekk B36 tvey mál, sum bæði komu eftir deyðbóltar. KÍ verjan vísti stórar veikleikar í deyðbóltum móti endanum av dystinum, og tað kostaði sigurin.

Tað var Egil Zachariassen, sum javnaði fyri útiliðið. Jákup á Borg sendi eitt hornaspark hart innfyri, har Meinhard Joensen fær nevan á bóltin, sum fer beint upp í loft. Egil Zachariassen var hægstur, tá bólturin dettur niðurafta í málteigin. 1-1 og stór frøi á teimum mongu B36-viðhaldsfólkunum, sum vóru komin norð at hyggja.

Løtu seinni skeyt John Petersen vinnandi málið. Liðformaðurin hjá B36 hevði annars ikki havt nakran góðan dyst, tí KÍ verjan var røsk at ansa eftir vandamikla áleyparanum.

Jákup á Borg sendi eitt fríspark innfyri málið, har KÍ verjan dráslar við at skjóta burtur, og bólturin dettur tilvildarliga fyri føturnar á John Petersen, sum avgerð dystin.

B36 vann, og fleiri B36-arar munnu tevja gullið longu nú.

KÍ – B36 1-2 (0-0)

1-0: Kurt Mørkøre
1-1: Egil Zachariasen
1-2: John Petersen
Dómari: Niklas á Líðarenda (GÍ)

KÍ: Meinhard Joensen – Atli Danielsen, Jan Andreasen, Ove Nysted – Hjalgrím Eltør, Jan Joensen (liðf.), Allan Joensen, Tomislav Sivic (Símun Waag Høgnesen), Harley Bertholdsen (Rógvi Laksafoss) – Kurt Mørkøre, Aleksander Djordjevic

B36: Tróndur Vatnhamar – Egil Zachariasen, Pól Thorsteinsson, Arnbjørn Danielsen – Jens Kristian Hansen, Jan Guttesen (Áki Mørk), Klæmint Matras, Kenneth Jacobsen (Bjarni Prior) – Jákup á Borg, John Petersen (liðf.), Heðin á Lakjuni

GÍ-NSÍ 3-4 (0-2):

GÍ takkar fyri seg

Eitt satt undur skal til, um GÍ onkursvegna skal bjarga sær lívið í næstbestu deildini

2. DEILD
Jákup Mørk

Aloftast er tað so, at tey lið, sum standa seg væl í fremstu deildini, eisini hava eitt aðru deildarlið, sum stendur seg hampuliga væl í kappingini hjá teimum næstbestu.

Hjá GÍ hevur hetta tó ikki verið støðan, og orsøkin til hetta er eisini sera einføld. Nevnliga at felagið - hóast góðu úrslitini hjá bestu manningini – hevur ein sera smalan hóp, og at tað tískil ofta hevur knípt við at seta eitt sterkt aðru deildar lið saman.

Lagnudystur

Undan heimadystinum móti NSÍ leygardagin vistu gøtumenn, at teir satt at siga vóru noyddir at fáa stig, um vónin fyri framhaldi í deildini skuldi varðveitast. Trý stig vóru upp til KÍ á níggjunda plássinum, men tá liðini hava vunnið hvør sín innanhýsis dyst, og GÍ hevði ein væl verri málmun, skuldu stig fáast til vega, fyri at hava møguleikan at fara framvið klaksvíkingunum.

Kanska var kalda lotið eftir vøllinum eisini ein ímynd av óhugaligu støðuni, sum GÍ var í, tá farið varð á vøllin. Vindurin darvaði eisini spælinum nakað, og í øllum førum høvdu partarnir báðir ilt við at fáa nakað veruligt samanspæl í gongd. Onkrir hissini málmøguleikar vóru tó, men alofast vóru endaligu skotini alt ov óneyv, soleiðis at málverjarnir ongar trupulleikar høvdu av hesum.

Tað bragdaði tó hjá runavíkginunum, tá fyrri hálvleikur var um at verða hálvliðin. Ein bóltur varð sendir innfyri, og staddur miðskeiðis í brotsteiginum kundi Sverri Justinussen stýra í málið við høvdinum. Hetta líktist leingi hálvleiksstøðuni, men stutt fyri steðgin var Mortan Hansen rætti maðurin á rætta staðnum, og so vóru tvey á muni.

Hóast ringu støðuna, so fullu gøtumenn ikki í fátt. Liðið telur fleiri av teimum leikarum, sum have verið við til at mynda eyðkenda stríðsviljan hjá GÍ, og ein av hesum leikarum var eisini maðurin, sum blásti lív í vónina.

Bert fáir minuttir vóru leiktir av seinna hálvleiki, tá Anton Skoradal minkaði um munin, og lív kom av álvara í, tá Omar Pálsson stutt eftir javnaði fyri GÍ.

Niðurflytingin tóktist soleiðis í øllum førum at vera útsett eina viku, men brádliga snaraðu runavíkingar øllum á høvdið. Við stuttum millumbili skutu teir báðir, Sverri og Mortan, hvør sítt mál afturat, og so var alt í grundini liðugt. Gaman í minkaði Símun Petur Justinussen aftur fyri GÍ, men sjálvt ikki tað kundi bjarga gøtumonnunum.

Enn er niðurflytingin ikki endaliga staðfest, men nærri eini staðfesting slepst neyvan. Umframt at GÍ skal vinna og KÍ tapa, so skulu gøtumenn vinna 13 mál inn á kappingarneytarnar í botninum, og hóast møguleikin á pappírinum sjálvsagt skal roynast, so munnu sjálvt teir mest bjartskygdu gøtumenninir nú hava ásannað, at GÍ hevur takkað fyri seg á hesum sinni.

GÍ-NSÍ 3-4 (0-2)

0-1: Sverri Justinussen
0-2: Mortan Hansen
1-2: Anton Skoradal
2-2: Omar Pálsson
2-3: Sverri Justinussen
2-4: Mortan Hansen
3-4: Símun Petur Justinussen

Gøtumenn stríddust, men endin varð tó, at teir eftir øllum at døma hava takkað fyri seg í aðru deild

Mynd: Álvur Haraldsen

B36 – HB 2-0 (0-0)

B36 varðveitir vónina

B36 dróg longra stráið, tá grannaliðini brustu saman í 2. deild. HB hevði eisini gyltar málmøguleikar, men B36 var kaldari í avgerandi løtunum. B36 hevur enn møguleika fyri at vinna gullið

2. DEILD
Jákup Mørk

Tað vóru tvey skerd lið, sum fóru á vøllin sunnudagin, tí stórt fráfall hevur verið hjá báðum liðum í seinnu hálvu. HB, sum lá á odda stórar partar av fyrru hálvu, er nú av álvara steðgað upp, meðan B36 enn hevur møguleika at gera seg galdandi í oddinum.

Fyrri hálvleikur var heldur spakur við fáum veruligum málmøguleikum, og langt var ímillum veruliga ágangandi álop. Tað sá út til, at verjurnar høvdu gott tak á álopsleikarunum.

Bæði liðini høvdu tó møguleikar at skora fyrsta málið fyri steðgin. Ransins N. Djurhuus gjørdist einaferð púra leysur eftir útspæl frá Kaj Leo Johannesen í málinum, men áleyparin var ikki nóg neyvur. HB hevði kanska fleiri royndir á málið enn B36 fyri steðgin, men eingin megnaði at fáa bóltin um strikuna. Øssur Jacobsen hevði eisini ein gyltan málmøguleika, men B36-arin sendi framvið.

B36 avgjørdi

Eftir steðgin avgjørdi B36 dystin til egnan fyrimun. Fyrra málið skeyt Brynleif Hansen. Ein langur bóltur varð sendur inn í brotsteiginn, har Brynleif tók hann niður og sendi framvið Kaj Leo.

HB hevði eisini sínar møguleikar í seinna hálvleiki, men René Tórgarð stóð stinnur sum aftast skansi hjá B36.

Dysturin varð meira ella minni avgjørdur, tá B36 økti um leiðsluna og ein HB-ari varð sendur av vølli. Øssur Jacobsen brýtur ígjøgnum, men aftasti maður hjá HB nýtir neyðbremsuna og má undir brúsuna áðrenn dystarlok. Ragnar Poulsen sendir frísparkið hegnisliga uppum múrin og beinleiðis í netið.

Við bara tíggju monnum var lítil møguleiki hjá HB at venda dystinum, og B36 vann 2-0. Havnarliðið hevur enn møguleika at vinna deildina, men so skulu hini úrslitini laga seg væl. B36 skal í seinasta umfari til Leirvíkar. HB hevur einki at spæla fyri meira, og teir taka næsta vikuskiftið ímóti GÍ í Havn.

B36 – GÍ 2-0 (0-0)

1-0: Brynleif Hansen
2-0: Ragnar Poulsen